## Kursurin heldur sær ikki

Danski partabrævamarknaðurin er komin væl inn í 2009. Síðani 1. januar er marknaðurin hækkaður 8,74%, og tað er besta partabrævabyrjan nakrantíð.Tíverri er tað kortini ikki ein tendensur, sum fer at halda sær, metir partabrævastjóri í Sydbank, Bjørn Schwarz. Nú var 2008 eitt óvanliga vánaligt partabrævaár við markantum falli meginpartin av árinum. Við byrjanini av nýggja árinum síggja vit, at íleggjararnir síggja eitt sindur meiri ljóst upp á tað heila. Nú mugu vit so síggja, um lyklatølini komandi vikurnar staðfesta hetta – og tað vænta vit ikki, sigur Bjørn Schwarz við boersen.dk. Hækkingin á partabrævamarknaðinum kann, sambært Schwarz, síggjast sum eitt tekin um, at botnurin er náddur. Men tað væntar Bjørn Schwarz altso ikki, sambært boersen.dk

## Limaskapur og limagjøld

Føroya Skipara-og Navigatørfelag hevur altíð mælt føroyskum navigatørum, sum sigla í útlondum, til at vera limir í fakfelag, har skipið hoyrir heima. - Hetta er serliga galdandi fyri Norðurlond, sum hava vælvirkandi feløg og arbeiðsmarknað. Føroyskir navigatørar sigla eisini við skipum úr øðrum londum og við skipum undir hentleikafløggum. Á aðalfundi hjá FSN segði Eyðstein Djurhuus, formaður, at felagið gjarna vil bjóða hesum monnum limaskap, tó at Føroya Skipara-og Navigatørfelag ikki hevur samráðingarrætt fyri hesi størv. – Vit kundu brúkt okkara millumlanda sambond til at hjálpt hesum limum, tá trupulleikar taka seg upp. Sum nú er, hava vit bert limir, sum vit hava sáttmála fyri og hvílandi limir, segði formaðurin í FSN.

# Stór óvissa um útlit í

**- Vit eiga ikki at vera svartskygd bara fyri at vera svartskygd. Fíggjarkreppan hevur ført til, at eftirspurningurin eftir vørum og tænastum er minkaður, og hetta merkir aftur, at bæði fíggingarstovnar og fyritøkur annars eru vorðin meira varin. Tað er samanfall millum hesi viðurskifti sum ger, at áhugin at fíggja ikki er so stórur í løtuni, sigur stjórin í Vinnuhúsinum**

VINNUÚTLIT
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*




*Marita Rasmussen hevur nú verið stjóri í Vinnuhúsinum í eitt ár, og hon heldur, at hetta árið hevur virkað drúgt, nú so nógv hevur verið á skránni á vinnuliga økinum*

Marita Rasmussen hevur nú sitið eitt ár í starvinum sum stjóri í Vinnuhúsinum, ið hevur stóran part av okkara framleiðsluvinnu á landi undir sínum hatti.

Hon tók við hesum starvi eftir at Jan Mortensen, sum hevði verið stjóri árini undan, fór í annað starv.

- Mær tykir, at hetta árið hevur virkað drúgt, nú so nógv ymisk viðurskifti hava verið á skránni. Árið byrjaði rímiliga væl, og útlit vóru til, at vit fóru at fáa eina stagnatión í 2008.

Hon vísir á, at sum fyrra hálvár leið, øktust oljuprísir og renta, og fíggjarviðurskiftini kring um heimin gjørdust rættiliga buldraslig út á heystið.

- Hetta saman við lágari norskari krónu, lækkandi pundi og lítlum toskafiskiskapi í okkara sjógvi, hevur gingið út yvir kappingarføri í fiskavirkisvinnuni, samstundis sum ísfiskavinnan við hækkandi oljuprísum og minni fiskiskapi av dýrari fiskasløgum sum heild hevur havt tað svárt.

### Ein trupul tíð

Marita vísir á, at stagnatión-in, sum var væntandi fyri einum ári síðan, í staðin gjørdist ein trupul tíð hjá føroyskari framleiðsluvinnu.

- Í fleiri ár hevur fiskavirkjunum vanta arbeiðsmegi, og tey hava tí ikki kunna bygt upp ta framleiðslu og støðugu leveransu, sum tey kundu hugsað sær. Í dag, nú líkt er til, at fleiri og fleiri fólk kanska kundu verið tøk í hesi framleiðslu, stríðast virkini við tað, tey ikki fingu gjørt, meðan marknaður var til tess. Fíggjarkreppan úti í heimi saman við lækkandi gjaldoyrisvirði hjá okkara kapp-ingarneytum ger, at framleiðsluvinnan er í eini truplari tíð, bæði tá ræður um hýsu á bretska marknaðinum og toski á evropeiska